52-090/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 90/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Honnu Jensen, løgtingsmanni, um koronupass

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Á hvørjum heimildargrundarlagi hvílir nýtslan av koronupassinum í føroyska samfelagnum?
2. Hvør er orsøkin til, at spurningurin um at nýta koronupassið ikki er viðgjørdur í Løgtinginum?
3. Hvørjar eru heilsufakligu grundgevingarnar fyri at seta sum treyt nýtslu av koronupassi ymsastaðni í føroyska samfelagnum ?
4. Eru heilsufaklig prógv um, at koronupassið tálmar smittutrýstinum í samfeløgum, har tað verður nýtt, og er hetta effektivari enn koronukanningar ?
5. Hvat merkir tað løgfrøðiliga, tøkniliga og praktiskt, at føroyska koronupassið er ES-góðkent?
6. Kann uttan serstaka lógarheimild verða álagt privatpersóni at vísa ella upplýsa um viðkvæmar upplýsingar so sum kanningarúrslit og koppsetingarstøðu fyri feløgum og øðrum privatpersónum fyri at luttaka í almennum og privatum tiltøkum?
7. Hava almennir og privatir arbeiðsgevarar í Føroyum heimild at krevja upplýsingar um heilsustøðuna hjá sínum starvsfólki t.d. gjøgnum koronupass, sum treyt fyri at kunna møta til arbeiðis ella fáa eitt arbeiði?
8. Ætlar løgmaður at tryggja teimum, sum ikki ætla at nýta talgildar heilsuupplýsingar sum atgongumerki til arbeiði og annað virksemi í samfelagnum, frítt at ferðast og virka í samfelagnum ?
9. Ætlar løgmaður at tryggja minnilutanum av føroyingum, sum ikki eru koppsettir fyri koronu, framvegis at kunna virka frítt í føroyska samfelagnum ?

Svar:

Til spurning 1.

Spurningurin má liðast sundur í tvey. Hjá lands- ella kommunustovnum er tað soleiðis, stovnsleiðarin hevur á ólógásettum grundarlagi í fyrisitingarrættinum, heimild at áseta skilhaldsreglur fyri tey sum koma á gátt á stovninum. Hesar reglur skulu vera sakligar og vera stovninum og samfelagnum annars at frama. Í hesum sambandi kunnu ásetast reglur um at hindra at smittandi sjúka spjaðir seg á stovninum. Stovnsleiðarin kann eitt nú krevja koronapass, av teimum sum koma á gátt, sum treyt fyri at tey sleppa inn. Somuleiðis kann hann ella hon krevja, at tey sum koma á staðið, skulu lata seg í serligan verndarbúna.

Landsstýrismaðurin á økinum, ella viðkomandi borgarstjóri, kann geva tænastuboð um, at stovnsleiðarin skal seta í verk ávís tiltøk á stovninum at basa smittu á stovninum.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Hjá privatum, tað verði seg: vinnufyritøkum, ítróttar- og mentanarfeløgum ella áhugafeløgum o.l. er ongin lóggávuheimild fyri at krevja, at tey sum koma á gátt hjá teimum skulu vísa fram koronapass ella bera serligan verndarbúna. Men, Farsóttarnevndin hevur í lógini um smittandi sjúkur § 7 heimild til at stongja fyritøkuna vil illa til.

Hinvegin, so gera tey privatu sjálvi av, um tey velja at krevja av teimum, sum koma á gátt, at tey hava koronapass ella er í verndarbúna. T.d. ein frisørur ið jú eigur fyritøkuna sjálv/ur, er frítt fyri at gera av hvør er kundi í fyritøkuni. Harumframt, kann landsstýrið altíð mæla teimum privatu til at krevja koronapass. Men, tey hava ikki skyldu at fylgja tilmælinum.

Til spurning 2.

Landsstýrið hevur frá byrjan valt, at Føroya fólk skal koma í gjøgnum koronakreppuna í felag. Í staðin fyri at seta lógarkrøv, hevur landsstýrið valt ein leist við tilmælum, har hvør einstakur hevur tikið ábyrgd. Arbeiðsgongdin higartil hevur verið, at landsstýrið fær tilráðingar frá Farsóttarnevndini, og viðger síðani um nýggj tilmæli skulu setast í verk. Tilmælini frá landsstýrinum hava ikki verið løgd fyri løgtingið. Tó hevur løgmaður leypandi kunnað allar flokkarnar á tingi um støðuna.

Til spurning 3.

Í skrivi 23. november 2021 hevur Landslæknin upplýst fylgjandi um spurningin:

> *"Endamálið við koronapassinum er at minka um vandan fyri, at ein persónur ið ferðast í samfelagnum, gerst smittaður við COVID-19. Eitt koronapass er gildigt, tá ein av trimum treytum er uppfylt:*
>
> *1. Lidna koppseting, ið ikki er eldri enn eitt ár*
> *2. PCR-kanning, ið ikki er eldri enn 72 tímar*
> *3. PCR-kanning, sum váttar fyrrverandi smittu seinasta árið.*
>
> *Eitt koronapass gevur sostatt ikki 100% vissu fyri at persónurin ikki er smittaður við COVID-19, men tað minkar um vandan. Koronapass verður nýtt í øllum Evropa, og er ein viðvirkandi orsøk til, at samfelagið kann virka, um ikki normalt, so uppá ein máta, har borgarar kunnu fara til arbeiðis og luttaka í flest øllum frítíðarvirksemi.*
>
> *Koronapassið bleiv sett í verk í Føroyum, tá smittutrýstið var øgiliga høgt. Tað hægsta í Evropa. Endamálið var at halda smittutrýstinum niðri, soleiðis at sjúkrahúsverkið ikki kom undir trýst. Samstundis kundi sleppast undan at lata samfelagið aftur. Farsóttarnevndin metti, at koronapassið samstundis kundi verða við til at halda týdningarmiklu samfelagshjólini koyrandi, m.a. arbeiðspláss, dagstovnar, skúlar og frítíðarvirksemi."*

(Umseting hjá Løgmansskrivstovuni)

Til spurning 4.

Í skrivi 1. desember 2021 hevur Landslæknin upplýst fylgjandi um spurningin:

> *"Eitt koronapass er eitt væl roynt amboð í tí mesta av Evropa, og hevur verið viðvirkandi til at samfelagið kann vera opið, samstundis sum smittutrýstið er hildið niðri. Tað hevur ikki verið møguligt at finna vísindalig prógv fyri virknaðinum.*

Koronapassið gevur ikki 100% tryggleika fyri at ein persónur ikki smittar, av tí at koppsett eisini kunnu gerast smittaði og bera smittuna, eins og ein persónur við negativari kanning kann bera smittuna eftir at kanningin er gjørd. Tekin eru um, at koppsett fólk ið fáa COVID-19, smittað minni, enn ókoppsett fólk ið fáa COVID-19.

Tað er ikki møguligt at gera av, hvørt ein persónur við negativari PCR-kanning, yngri enn 72 tímar ella ein persónur ið er líðugt koppsettur, eru í ymiskum vanda fyri at bera smittuna. Bæði parametur eru tískil javnmett í koronapassinum."

(Umseting hjá Løgmansskrivstovuni)

Til spurning 5.

Til innanhýsis nýtsluna í Føroyum hevur tað ongan løgfrøðiligan, tøkniligan og praktiskan týdning, at føroyska koronapassið er ES góðkent:

Um týdningin av hesum uttanfyri Føroyar sigur Uttanríkis- og mentamálaráðið:

"ES hevur samtykt reglur um møguleikan fyri at javnseta covid-19 váttanir, útflýggjaðar av triðjalondum, við talgildu covid-19-váttanina hjá ES.

Tann 14. september 2021 tók ES-kommissiónin avgerð um, at covid-19 váttanir, sum eru útflýggjaðar av Føroyum, verða javnsettar við evropeisku talgildu covid-19 váttanina sambært ES-fyriskipan nr. 2021/953, sbr. avgerð nr. 2021/1478 frá ES-kommissiónini. Góðkenningin av føroysku covid-19 váttanini kom í gildi tann 15. september 2021 og varð grundað á tøkniliga eftirkanning av føroysku loysnini í ES.

Sambært grein 1 í avgerðini hjá ES-kommissiónini skulu covid-19 váttanir, útflýggjaðar av Føroyum, verða viðfarnar á sama hátt sum váttanir útflýggjaðar í ES sambært omanfyrinevndu fyriskipan. Hetta er galdandi fyri koppsetingarváttanir og kanningarúrslit.

Hetta merkir, at føroyskar covid-19 váttanir verða viðurkendar í ES, á sama hátt sum talgilda covid-19 váttanin hjá ES. Samstundis verða váttanir, ið ES og góðkend triðjalond útflýggja, viðurkendar í føroysku talgildu covid-19 loysnini."

Til spurning 6.

Nei, ongin heimild er at krevja upplýsingarnar. Viðkomandi er frítt fyri at velja at siga nei til at geva upplýsingarnar. So hendir ikki annað enn at viðkomandi kann verða noktaður atgongd til tiltakið.

Til spurning 7.

Onki er til hindurs fyri at arbeiðsgevarin og lønmóttakarin, á fríum grundarlagi, semjast um at lønmóttakarin vísir koronapass í samband við arbeiðið. Neyvan er nakað heldur til hindurs fyri at arbeiðsgevarin umskipar arbeiðið soleiðis at tað ikki er neyðugt hjá lønmóttakaranum at vísa fram koronapass.

Hvør rættarstøðan er um lønmóttakarin ikki vil vísa koronapass og arbeiðsgevarin letur hetta fáa starvsrættarligar avleiðingar er óvist. Onki dómsfordømi er um hetta í Føroyum.

Til spurningar 8 og 9.

Yvirskipaða málið hjá landsstýrinum hevur verið at leiða Føroya fólk trygt gjøgnum koronakreppuna, soleiðis at Føroya fólk kemur so væl burturúr henni, sum gjørligt. Bæði menniskjaliga, búskaparliga og heilsuliga. Harumframt hevur málið eisini verið, at Føroya fólk skal kunna liva so frælst sum gjørligt.

Fyri at røkka hesum málunum kann landsstýrið nýta ymisk amboð. Eitt nú, koppseting, innlendis kanningar, koronapass, smittusporan, avbyrging og sóttarhald, umframt møguleikan at lata samfelagið aftur í størri og minni mun.

Samanumtikið hevur tað verið avgerandi hjá landsstýrinum at brúka tey amboðini, sum á bestan hátt tryggja, at vit røkka yvirskipaða málinum.

Løgmaður ætlar ikki at tilmæla brúk av koronapass longri enn neyðugt. Við ferðsluljósskipanini verður koronapass ikki tilmælt, tá ið smittutalið í meðal seinastu 7 dagarnir fer niður um 15.

Í Tinganesi, 3. desember 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður